## Fimta hjá Drátti

Steypafinalan hjá kvinnunum í morgin er tann fimta hjá Drátti, sum hevði tapt tríggjar finalur, áðrenn tað í 2007 endiliga eydnaðist at vinna fyri fyrstu ferð. Hjá SÍ er hetta hinvegin bert triðja finalan, men afturfyri er hetta triðja árið á rað, at SÍ er í steypafinaluni.

## TB vunnið oftast

Av teimum seks liðunum, sum síðani 2000 hava spælt steypafinalurnar hjá kvinnum, er TB tað mest vinnandi við fýra sigrum. Harnæst kemur Mjølnir við trimum og so hava Dráttur, ÍF og SÍ vunnið hvør sína. TB hevur fimm ferðir verið í finaluni, men ta leiðsluna tangerar Dráttur í morgin.

# Gleða seg til grannafinalu

**Bæði Helga Guttesen í SÍ og Elida Falkvard í Drátti gleða seg at spæla kvinnufinaluna í morgin, sum er ein rein vágauppgerð. Báðar eru samdar um, at tær møta júst tí liðnum, tær helst vilja vinna á**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Tær báðar ferðirnar, SÍ og Dráttur hava spælt ímóti hvørjumøðrum higartil í landskappingini, hevur SÍ vunnið sannførandi 3-0. Samstundis er SÍ nummar eitt í landskappingini og Dráttur nummar fýra, so á pappírinum munnu tey flestu síggja kvinnurnar úr Sørvági sum favorittar undan kvinnufinaluni.

Men tá talan er um eina finalu, kann alt henda, tí nú er tað ikki ein longri kapping, men hesin eini dysturin, ið skal avgerast. Og tá vit spyrja ein spælara av hvørjum liði, hvussu vánirnar eru undan kvinnufinaluni, stendur møguleikin opin fyri einum dysti, har alt kann henda.

– SÍ er klárt favorittur, um vit hyggja at stigatalvuni, men eg haldi ikki, at tað fær nakað at siga í finaluni. Hetta er jú ein grannauppgerð, so tað er av tí sama helst fyri bæði liðini ein serligur dystur, sum bæði liðini vilja vinna. Eg vænti í øllum førum, at tað verður ein fimmsettari, sigur 18 ára gamla Elida Falkvard í Drátti, sum í morgin spælir sína fyrstu steypafinalu.

– Vit elska at vinna á Drátti, men hava virðing fyri teimum. Vit ansa eftir, at vit ikki halda okkum hava vunnið dystin áðrenn, men spæla vit upp til okkara besta, so vinna vit. Hetta er jú ein finala, so alt kann henda – eisini, at tað verður ein fimmsettari, sigur 21 ára gamla Helga Guttesen í SÍ.

### Bara flogbóltstos

Bæði Helga og Elida siga, at í bygdunum vesturi í Vágum hevur ikki verið tosað um nógv annað enn flogbólt, nú steypafinalurnar eru komnar alsamt nærri.

– Sjálvt tey, sum vit ikki halda fylgja við flogbólti, spyrja okkum, hvat vit vænta, so tað verður stórt sæð ikki tosað um annað enn flogbólt í Sørvági í hesum døgum. At vit so eisini skulu spæla ímóti Drátti, ger fólk uppaftur spentari, og fyri okkum er tað ordiliga deiligt, tí so vita vit, at tað verða nógvir áskoðarar. Tá er tað altíð stuttligari at spæla, sigur Helga.

Tað sama sigur Elida, ið heldur, at tað hevur verið óvanliga nógv flogbóltsprát í bæði Sandavági og Miðvági hesa vikuna. – Fólk tosa nógv um tað, og vit rokna við, at nógv koma at stuðla okkum, so tað verður lív í, sigur hon.

Dráttur hevur havt eina rættiliga tronga dystarskrá síðstu tíðina, men tað heldur Elida bara vera ein fyrimun undan finaluni í morgin: – Vit hava fingið ríkiligt av dystarvenjing, men av tí at tað er eitt sindur síðani, at vit møttu SÍ síðst, so verða vit eyka uppsettar til finaluna, heldur hon.

SÍ hevur hinvegin ikki spælt dyst í næstan hálvaaðru viku, men um vikuskiftið vóru kvinnurnar úr Sørvági á venjingarlegu í Kollafirði. – Í Sørvági spæla vit jú í einari lítlari høll, men vit hava vant eitt sindur í Kollafirði, so vit kundu venja okkum við umstøðurnar í einari stórari høll, sigur Helga Guttesen.

**Helga Guttesen í SÍ og Elida Falkvard í Drátti gleða seg til kvinnufinaluna í morgin – og báðar møta í finaluni tí liðnum, tær helst vilja vinna á**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**Steypafinalur hjá kvinnum 2000-2009**

| *Ár* | *Lið* | *Úrslit* | *Settúrslit* |
|---|---|---|---|
| 2000 | Mjølnir-Dráttur | 2-0 | (21-16, 21-16) (21-18, 24-22) *) |
| 2001 | Mjølnir-Dráttur | 3-2 | 17-25, 17-25, 25-23, 25-15, 19-17 |
| 2002 | TB-Mjølnir | 3-1 | 25-18, 25-23, 13-25, 25-22 |
| 2003 | TB-ÍF | 3-1 | 25-17, 24-26, 27-25, 25-20 |
| 2004 | TB-Dráttur | 3-1 | 25-11, 20-25, 25-16, 25-19 |
| 2005 | Mjølnir-TB | 3-1 | 25-20, 25-21, 13-25, 25-19 |
| 2006 | TB-ÍF | 3-1 | 32-30, 25-19, 23-25, 25-16 |
| 2007 | Dráttur-KÍF | 3-2 | 19-25, 25-19, 21-25, 25-08, 15-13 |
| 2008 | ÍF-SÍ | 3-0 | 25-12, 25-17, 25-21 |
| 2009 | SÍ-Fleyr | 3-1 | 25-19, 25-21, 22-25, 30-28 |

**) Í 2000 var spælt eftir Nordic Score-skipanini*

## SÍ SØRVÁGUR



| Nr. | Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Karin Mikkelsen | 24 | 165 | Kantur | 35 | Føroyar |
| 2 | Betina Egholm | 32 | 175 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 3 | Hervør Hansen | 21 | 166 | Hevari | 0 | Føroyar |
| 4 | Helen Skaalum | 24 | 165 | Kantur | 0 | Føroyar |
| 5 | Helga Guttesen | 21 | 182 | Diagonal | 11 | Føroyar |
| 6 | Vivian Joensen | 19 | 174 | Kantur | 0 | Føroyar |
| 7 | Torfrið Tausen | 25 | 164 | Libero | 0 | Føroyar |
| 8 | Ann-Britt Thomassen | 24 | 163 | Kant/diag. | 0 | Føroyar |
| 9 | Annika Niclasen | 24 | 174 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 10 | Heiði Christiansen | 18 | 174 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 11 | Annika á Stongum | 21 | 164 | Hevari | 26 | Føroyar |
| 12 | Lisa Niclasen | 17 | 161 | Kantur | 0 | Føroyar |
| 13 | Verna Hansen | 21 | 159 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 14 | Nansy Mikkelsen | 17 | 161 | Libero | 0 | Føroyar |

**Liðformaður:** Karin Mikkelsen
**Venjari:** Jóhan Petur á Stongum
**Hjálparvenjari:** Kári Mikkelsen
**Liðleiðari:** Kaj á Stongum

## DRÁTTUR SANDAVÁGUR



| Nr. | Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Elida Falkvard | 18 | 172 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 2 | Helga Nordendal | 34 | 184 | Kantur | 32 | Føroyar |
| 3 | Rannva Olavsdóttir | 38 | 173 | Kantur | 0 | Føroyar |
| 4 | Aleth Lamhauge | 27 | 168 | Diagonal | 0 | Føroyar |
| 5 | Maja Filipovic | 28 | 175 | Hevari | 0 | Bosnia-Hers. |
| 6 | Hanna Hansen | 16 | 171 | Miðja | 0 | Føroyar |
| 7 | Elin Akselsen | 27 | 172 | Diagonal | 0 | Føroyar |
| 8 | Elspa Suffía Joensen | 29 | 179 | Miðja | 5 | Føroyar |
| 9 | Sunneva Gaardlykke | 14 | 171 | Kantur | 0 | Føroyar |
| 10 | Herborg á Mýrini | 30 | 173 | Kantur | 20 | Føroyar |
| 11 | Tórunn Joensen | 14 | 168 | Hevari | 0 | Føroyar |
| 12 | Gerda Nattestad | 30 | 172 | Libero | 15 | Føroyar |
| 14 | Sonja Davidsen | 14 | 170 | Libero | 0 | Føroyar |
| 15 | Laila Christiansen | 14 | 166 | Kantur | 0 | Føroyar |

**Liðformaður:** Helga Nordendal
**Venjari:** Elisabeth Rasmussen
**Hjálparvenjari:** Suni Hansen
**Liðleiðari:** Ruth Thomassen